# Landssjúkrahúsið

## Summarfrítíðaravloysarar

**Sjúkrasystrar**
**Sjúkrahjálparar**
**Heilsuatstøðarar**
**Pleygarar**

Á Landssjúkrahúsinum verða hesi størv leys at søkja:

A2 – Føðideildin
**3 sjúkrasystrar** frá 1. juni 2000 til 31. august 2000. Fulla tíð.

E3 – med./røktardeild
**3 sjúkrasystrar** frá 1. mai 2000 til 31. august 2000. Fulla tíð ella eftir avtalu.
**1 sjúkrahjálpari/heilsuatstøðari** frá 1. mai 2000 til 31. august 2000. Fulla tíð ella eftir avtalu

B4 – barnadeildin
**2 sjúkrasystrar** frá 15. juni 2000 til 31. august 2000. Fulla tíð ella eftir avtalu.

B5 – skurðdeild
**4 sjúkrasystrar** frá 15. juni 2000 til 31. august 2000. Fulla tíð ella eftir avtalu.

B8 – intensiv/cardiologisk deild
**1 sjúkrasystir** við royndum frá intensivari deild, frá 1. juni 2000 til 31. august 2000. Fulla tíð.

D2 – akutt psyk. móttøkudeild
**1 sjúkrasystir** á fulla tíð í blandaðum vaktum, frá 16. juni 2000 til 31. august 2000.
**1 pleygari/heilsuatstøðari** á fulla tíð í blandaðum vaktum, frá 16. juni 2000 til 31. august 2000.

D6 – langtíðardeild
**1 sjúkrasystir** á fulla tíð frá 1. juli 2000 til 31. august 2000.
**1 pleygari/heilsuatstøðari** á fulla tíð frá 1. juli 2000 til 31. august 2000.

D7 – deild fyri senil dement
**2 sjúkrasystrar** á fulla tíð frá 1. juni 2000 til 31. august 2000.

**Sjúkrasystir** til kvøld-, náttar-, og vikuskiftisvaktir sum »ábyrgdarhavandi sjúkrasystir« (trissa) frá 1. juni 2000 til 31. august 2000.

**1 sjúkrasystir**, við serútbúgving í anæstesi, til anæstesideildina frá 1. juni 2000 - 31. august 2000.

**1 sjúkrasystir** til skurðdeildina skjótast gjørligt og fram til 31. august 2000. Sjúkrasystir ið søkir, skal hava royndir frá skurðdeild.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til deildarsjúkrasystrarnar á avvarðandi deildum, tlf. 313540.

Løn og setanartreytir sambært avtalu ímillum avvarðandi fakfelag og Fíggjarmálastýrið.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum skal sendast til

**Almanna- og heilsumálastýrið**
**Starvsfólkadeildin**
**Eirargarður 2**
**100 Tórshavn**

Umsóknarfreistin er 3. apríl 2000, kl. 14.00.

---

Føroya Sjúkrahjálparafelag

## Aðalfundur

Aðalfundur felagsins verður í hølum FØROYA ARBEIÐARAFELAGS, Tjarnadeild 5, 100 Tórshavn,

**fríggjadagin 14.04.2000 kl. 10.00.**

Fundarskrá:
1. Nevndarfrágreiðing fyri farna árið
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi
3. Val av nevnd og tiltakslimum
4. Val av grannskoðara
5. Innkomin uppskot
6. Ymiskt

**Nevndin**

---

## Skrivstovustarv

Føroya Shell søkir starvsfólk til bókhaldið á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn.

**Arbeiðið fevnir um:**
- Ábyrgd av ognarabókhaldinum
- Avgreiðslu av viðskiftafólki
- Kunna avloysa við EDV-skipanina
- Annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

**Vit vænta at tú hevur:**
- Útbúgving og royndir innan skrivstovuyrkið
- Royndir innan ognarabókhald
- Hollan kunnleika til EDV og at tær dámar at samskifta við onnur.

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv við avbjóðingum
- Møguleikar fyri útbúgving og persónligari menning
- Góða løn í samsvar við útbúgving og royndir.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja á telefon 34 74 00 lokal 213.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum kann sendast til P/F Føroya Shell, Postbox 188, 110 Tórshavn og má vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. mars 2000.

**Shell**

---

## Ung í arbeiði

Vestmanna Kommuna hevur møguleika at søkja um stuðul til tiltakið »ung í arbeiði«. Tiltakið er fyri arbeiðsleys í aldrinum 16-26 ár.

Áhugað verða biðin um at venda sær til kommunuskrivstovuna, tlf. 424103, í seinasta lagi 30. mars kl. 12.00.

**Vestmanna Kommuna**

---

FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ

## Lærlingur til Fíggjarmálastýrið

Søkt verður eftir einum lærlingi til Fíggjarmálastýrið. Arbeiðsøkið er sjálvt Fíggjarmálastýrið.

**Í Fíggjarmálastýrinum verður arbeitt við:**

- Játtanarskipan landsins
- Fíggjarlóg og øðrum játtanarlógum
- Kapitalmarknaðarviðurskiftum
- Búskaparanalysum
- Búskaparmodellum
- Toll-, skatta-, og mvg-lógarfyrireiking

**Starvið fevnir um:**
Sum lærlingur kemur tú at fáast við alt vanligt skrivstovuarbeiði umframt journalisering við nútímans framkomnari útgerð.

**Førleiki:**
Vit hava hugsað okkum, at tú
- hevur FHS, HH, ella líknandi prógv
- hevur lætt við at samstarva
- hevur lætt við at málbera teg bæði skrivliga og munnliga
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- hevur telduførleika
- hevur góðan røkjuskap

Fíggjarmálastýrið heldur til úti á Argjum saman við Føroya Gjaldstovu, Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum, Hagstovu Føroya og Lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum. Talan er sostatt um eitt stórt og spennandi arbeiðsumhvørvi.

**Setunartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsókn**
Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal verða send til:

**Fíggjarmálastýrið**
**Traðagøta 39**
**Postboks 2039**
**FO-165 Argir**

Vit skulu hava fingið umsóknina í seinasta lagi mánadagin 27. mars 2000 kl. 12.00.

Starvið verður at seta skjótast tilber.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú ringja til Borgarhjørt Kragesteen, deildarskrivara á tlf. 35 20 20.

---



## *SÝNSMAÐUR* TIL TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

**Søkt verður eftir sýnsmanni til deild felagsins í Klaksvík at byrja skjótast gjørligt.**

Arbeiðsuppgávan hjá sýnsmanninum verður at sýna skaðar á bygningar og leysafæ. Eisini fevnir arbeiðið um virðismetingar og váðametingar.

Starvsøkið fevnir serliga um sýnsøki stovnsins í Norðoyggjum, og sýnsmaðurin verður ein partur av deild felagsins í Klaksvík.

Ynskiligt er, at tú hevur útbúgving sum bygningshandverkari og byggifrøðingur ella líknandi, og at tú hevur praktiskar royndir innan hesi øki. Eisini er tað ein fyrimunur, um tú hevur telduførleika á brúkarastøði.

Dentur verður lagdur á góð samstarvsevni, og at tú ert fyrikomandi.

Vit bjóða eitt áhugavert starv við góðum arbeiðsumstøðum, og vænta at tú tekur útbúgving innan trygging.

Starvið verður lønt sambært sáttmálanum millum Yrkisfelagið Trygdin og AFF.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Mads Guttesen, tel. 345730.

*Umsóknir, saman við prógvum og viðmælum, skulu verða Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 31. mars 2000.*

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Kongabrúgvin, P.O.Box 329, FO-110 Tórshavn, Faroe Islands
Tel +298 345600, Fax +298 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

SANSIR · TEL 355 355

---

# Undirvísingar- og Mentamálastýrið

## Lærugreinaráðgevar

**Starvið**
Í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum/Landsmiðstøðini fyri Undirvísingarамboð eru nakrir tímar sum ráðgevar leysir at søkja til setanar frá 1. august 2000.

Ráðgevingin fatar um øll lærugreinaøkini í fólkaskúlanum, skúlabókasavnið og KT-økið. Dentur verður lagdur á, at arbeitt verður í tvørgreinaligum hópi, og møguleiki er at søkja eina ella fleiri lærugreinir – eisini tvørtur um lærugreinaøkini.

Samanlagt eru 81 lønartímar um vikuna at søkja (ein lønartími svarar til umleið 1 fyrisitingartíma). Vanliga verður ráðgevi settur við 8 til 12 lønartímum um vikuna.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein/-um og starvsøkjum, starvið fevnir um. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava hollan førleika á KT-økinum, og væntað verður, at teir eru hugaðir at nýta KT í ráðgevastarvinum.

**Setanar- og lønartreytir**
Lærugreinaráðgevin verður sett/settur eftir avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag. Tann, ið sett/settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skal verða Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin 5. apríl 2000.

Gjøllari upplýsingar fáast frá leiðaranum á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
**Landsmiðstøðin fyri Undirvísingarамboð**

***Undirvísingar- og mentamálastýrið*** *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.* ***Landsmiðstøðin*** *er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarамboð, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við UMMS eina lærugreinráðgevaskipan og skipar fyri fak- og inspiratiónsskeiðum fyri lærarum*

---

# Undirvísingar- og Mentamálastýrið

## Umsóknir

**um stuðul frá norðurlendsku bókmenta- og bókasavnsnevndini til týðing av bókmentum hjá grannalondum, týðingarstudning og fólkbókasavnssamstarv**

Boðað verður við hesum frá, at vegleiðingarbløð og umsóknarbløð til stuðul frá noðurlendsku bókmenta- og bókasavnsnevndini (NORDBOK) til týðing av bókmentum hjá grannalondum o.ø. fáast við at venda sær til Undirvísingar- og Mentamálastýrið og Føroya Landsbókasavn. Freistin at søkja fyrstu ferð í 2000 er **1. apríl 2000.**

Gjørt verður vart við, at allar umsóknir hesum viðvíkjandi skulu sendast skrivstovuni hjá NORDBOK og skulu sostatt stílast:

**NORDBOK**
**c/o. Biblioteksstyrelsen**
**Nyhavn 31 E**
**DK-1051 København K**

---

sosialurin
Altið fyrst við
www.sosialurin.fo

---

Frá

## Suðurstreymoyar Javnaðarfelag

## Lýsti aðalfundurin

verður **mánakvøldið 20. mars kl. 20** í hølum Starvsmannafelagsins, J. H. Schrøtersgøta 9.

Skrá sambært lógum felagsins.

Eftir aðalfundin verður limafundur um býráðsarbeiði og komandi býráðsval. Býráðslimirnir vera við á fundinum.

**Nevndin**

---

## Lastbilur til sølu

MAN 8 tons, 150 HK við skiftilast, krana og komprimator.

**Tlf. 447959 ella 217181**

---

## Útróðrarbátur til sølu

»Sluppungin« Hvessingur SA-350 verður hervið lýstur til sølu. Báturin er 12 tons netto, og hevur ein 150 hesta Cummings motor. Hann hevur línuspæl, plottara, radara, ekkolod, VHF og fartelefon. Høvuðsumvældur fyrst í nítiárinum.

Er útgjørdur við 5 DNG íslendskum el-snellum og við keypinum fylgja 60 stampar av línu. Báturin hevur A fiskiloyvi í bólki 5. Klárur til línu- ella snellufiskiskap.

Er í løtuni á snelluveiðu á Norðhavinum, og rør út frá Klaksvík, har høvi er at síggja bátin. Kann yvirtakast beinanvegin.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja:

**Fartlf. 286283 ella eftir kl. 18 á kvøldi á tlf. 361623**

---

## Søkt verður eftir

álítandi og sjálvstøðugum timburmonnum til arbeiði í Noreg at byrja beinanvegin. Góð løn + akkord.

**Sp/f FK-smíð**
**Tlf. 284010 ella 004797090510**